# Nýggjur trolari til Tvøroyrar



*Hetta er nýggi Rasmus Effersøe, sum nú er keyptur til Tvøroyrar. Hann er væl betri egnaður enn tann gamli, sum nú verður lagdur*

**N.J. Mortensen hevur keypt djúpvatnstrolara úr Íslandi. Hann skal eita Rasmus Effersøe**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Nú á døgum er tað ikki oftani, at tað koma nýggj skip í føroyska fiskiflotan. Fíggjarliga úrslitið av fiskiskapi er so mikið vánaligt, at næstan ongin hættar sær undir eina rættiliga endurnýgging. Men tað er ein sannroynd, at tað er eisini ein endurnýgging at skifta gomul skip út við nýggjari skip.

Og nú, beint fyri jól, kom ein nýggjur trolari til landið.

Tað er Niels J. Mortensen á Tvøroyri, sum nú hevur keypt trolara úr Íslandi. Talan er um tolaran Haukur, sum nú kemur undir føroyskt flagg.

Hetta er ein gamal kenningur í Føroyum, tí hetta er Snoddið, sum toftamenn áttu í síni tíð. Í umleið 1990 varð hann seldur til Íslands, men nú er hann so keyptur aftur til Føroya.

Haukur er djúpvatnstrolari og tað er júst hetta, sum hann skal brúkast til, nú hann er komin til Føroya.

Gudmund Mortensen á Tvøroyri sigur, at nú Haukur er keyptur til Tvøroyrar, skal hann eita Rasmus Effersøe. Og tað er ikki av tilvild, tí hann skal koma í flotan fyri Rasmus Effersøe, sum N.J.Mortensen longu hevur, men sum nú verður lagdur. Enn er ikki gjørt av, um hann verður seldur, ella um roynt verður at finna aðrar útvgir fyri at varðveita hann í flotanum. Men fiskiloyvið er so farið til tann nýggja bátin.

Nýggi Rasmus Effersøe er nú á Skipasmiðjuni á Skála, har botnurin verður sýnaður, áðrenn keypið er heilt endaligt.

Men báturin er í góðum standi og roknað verður ikki við, at tað verður nakar trupulleiki. Ætlandi fer Rasmus Effersøe til fiskiskap um hálvan januar. Teir, sum mannaðu gamla Rasmus Effersøe flyta yvir á nýggja bátin. Og skipari verður Einar Hammer, sum hevur verið skipari á Rasmus Efferøe øll árini.

### Nýggjari og betri

Gudmund Mortensen sigur, at hesin nýggi Rasmus Effersøe er munandi betri enn tann gamli.

Fyri tað fyrsta er gamli Rasmus bygdur í 1963, og er sostatt 37 ára gamal. Hann varð upprunaliga bygdur til línuskip, men varð umbygdur til trolara og fekk stórar ábøtur í 1985.

Nýggi Rasmus er bygdur í 1984 og er sostatt ikki meiri enn 16 ára gamal. Hann er somuleiðis nógv betri innrættaður á dekkinum og spølini eru effektivari. Hann er eisini eitt sindur breiðari enn gamli Rasmus Effersøe.

Hesin nýggi Rasmus Effersøe kostar 16,5 milliónir. Gudmund Mortensen ásannar, at hetta er nógvur peningur, men gongur tað hampiligt við fiskiskapinum, skuldi tað borið til, sigur hann. Eitt nú skuldi útreiðslurnar til viðvíkahald blivið væl minni.

Annars hevur árið í ár roynst hampiligt hjá gamla Rasmus Efferøe. Hann hevur avreitt fyri einar 12 milliónir, men hann hevur kravt stórar ábøtur í ár, so úrslitið kundi verið frægari.

# Kempa viltist upp á turt í Hvalba

**Ein stórur avgustur svam seg upp á land í Hvalba annan jólamorgun, men tað eydnasðist ikki at fáa hann útaftur**

HVALUR
*Áki Bertholdsen*

Annan jóalmorgun svam ein stórur avgustur seg upp á sandinum í Nesi í Hvalba. Tað var í lýsingini annan jólamorgun, at hvalbingar varnaðust at hendan stóra kempan lá ov veltist í mølini, men tað var eyðsæð, at hon slapp ikki út aftur.

Boð vórðu send eftir verjuskipinum Tjaldrinum og tað kom suður seinnapartin annan jóladag við Dorethu Bloch Danielsen, hvalaserfrøðingi og Justinus Olsen, djóralækna, í eini roynd av bjarga hvalinum.

Tjaldrið royndi fleiri ferðir at seta enda á hvalin, men ann fór upp at berjast og endarnir gliðu av aftur. Sostatt var onki at gera og Tjaldrið gav skarvin yvir.

Ímóti kvøldið var hvalurin viknaður nógv og tað var longi ímillum at hann blásti. Og seinni doyði hann.



*Hendan deyða kempan svam seg upp á turt á sandinum í Hvalba annan jólamorgun. Hetta er ein avgustur, sum er einar 15 metrar langur.Føroyingar eta ikki tvøst av avgusti*

Doretha Bloch Danielsen sigur, at hesin avgusturin var um 15 metrar langur.

Avgustar kunnu blíva rættiliga gamlir, teir kunnu blívah eilt upp í 90 ára gamlir. Doretha Bloch Danielsen sigur, at elsti avgusturin, sum hon hevur kannað, var 47 ára gamal. Tann, sum gjørdi landgongd í Hvalba, kann væl verða eini 40-50 ára gamal.

Hon sigur, at orsøkin til, at teir soleiðis svimja upp á land, er, at teir villast. Teir kunna seg við einum slagi av sonar og tá ið botnurin skránar so líðani, rakar signalið ikki hvalin aftur. Tí heldur hann, at opið hav er fyri og varnast onki, fyrrenn ov seint er.

Tað hendir ikki so sjáldan, at avgustar villast á land. Doretha Bloch sigur, at tað hendir einar tríggjar ferðir um árið.

Japanarar eta tvøstið á avgusti, mn tað hevur ikki verið etið í Føroyum, tað sigst, at tað er ov seigt og ov sterkt. Men japanesarar duga at gera tað til, so at teimum dámar tað væl.



# Nýggju motorarnir roynast væl

**Ternan hevur lættari at halda ferðaætlanina við nýggju motorunum, sigur Strandferðslan**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Strandferðslan er væl nøgt við nýggju og størri motorarnir, sum fyri kortum vórðu settir í Ternuna.

Ternan hevur nú verið í sigling um Vestmannasund í næstan tvær vikur síðani umvælingina, og higartil hevur alt virkað eftir ætlan. Skipari og manning eru væl nøgd við motorarnar, og tað kann merkjast, at skipið hevur fingið størri manøvru-orku.

Hetta kemur væl við á Oyrargjógv, har tað stundum kann vera trupult at koma til og frá, og nýggju motorarnir gera tað lættari hjá Ternuni at halda ferðaætlanina.

### Nýggj ávaringarskipan

Saman við motorunum hevur Ternan eisini fingið nýggja ávaringarskipan, sum ger at fólk á høvuðsskrivstovuni í Havn kunnu síggja alt viðvíkandi maskinunum umborð - til dømis hvør motorur er í gongd, ymiskan hita, trýst, snúðningar og tímatøl fyri maskinuna.

Íløgan í nýggju motorarnar umborð á Ternuna kostaðu umleið í 3,7 milliónir krónur, og tá er ísetingin tikin við.



*Nýggju motorarnir umborð á Ternuni gera tað lættari hjá skipinum at halda ferðaætlanina*

# Vølvan spáar at føroyingar atkvøða ja á fólkaatkvøðu



*Íslendska Vølvan roknar við, at føroyingar fara at siga ja til fullveldi í komandi ári*

**Íslendska spákonan, Vølvan, roknar við, at føroyingar fara at atkvøða ja fyri fullveldi, men hon roknar við stórum trupulleikum í íslendska fiskaídnaðinum á landi**

SPÁDÓMAR
*Eyðun Klakstein*

Tiltikna íslendska vølvan hevur almannkunngjørt sínar spádómar fyri 2001, og hon sær fyri sær eitt dapurt ár við nógvum stríði, náttúruvanlukkum og fíggjarligum trupulleikum.

Vølvan plagar at koma við sínum spádómum móti endanum av árinum í íslendska blaðnum Vikan, og ársins boð er komið.

Sambært norðurlendskari gudalæru er vølvan ein spákona, og síðani fyrstu búsetingarnar í Íslandi í 9. øld, hava vølvurnar verið til. Higartil hevur eingin vita, hvør íslenska vølvan er, men í ár verður avdúkað, at hon eigur Sigriður Klingenberg.

### Bush tunga byrjan

Vølvan roknar við, at veruligt kríggj fer at bresta á í Miðeystri.

Hon heldur, at tær friðarsamráðingar, sum fara fram millum Ísrael og palestinar í løtuni, ongan frið fara at hava við sær, og Yassir Arafat fer at missa valdið orsaka av vánaligari heilsu.

Nývaldi forsetin í USA, Geroge W. Bush, fer sambært vølvuni at fáa eina harða byrjan, og innan stutta tíð farr atfinningarnar at regna yvir hann. Hinvegin fer tað at ganga væl hjá famijuni Clinton, roknar vølvan við.

Vølvan sigur, at í komandi ári fara náttúruvanlukkur at raka Turkaland, Filipinirnar og Kina. Harafturat fer eisini ein størri vanlukka at raka Afghanistan.

### Føroyingar siga ja

Ísland fer eisini at líða undir náttúruvanlukku. Komandi summar fer ein jarðskjálvti at raka Ísland, og síðani fer eisini at goysa nær íslendsku strondini.

Fiskiídnaðurin í Íslandi fer at fáa stórar trupulleikar, og nógv virki mugu lata aftur, tí størri partur av arbeiðnum verður gjørdur umborð á skipunum.

Og nú vit eru í grannalagnum, so fara føroyingar at siga ja á fólkatkvøðuni komandi ár, roknar Vølvan við. Hon heldur, at føroyingar komandi ár fara at vísa, at teir kunnu standa á egnum beinum, og at teir fara at siga ja til fullveldi.

Mótvegis øðrum heimspartum, har Vølvan roknar við ófriði, stríði og vanlukkum, verða Norðurlond merkt av friði og eini góðari tíð.

### Rætt og skeivt

Av ørðum, sum Vølvan roknar við í 2001, kann nevnast, at Bjørk fer at vinna eina Oscar fyri sín leiklut filminum í Dancer in the Dark, bretski boksarin Prince Nazeem fer at standa seg sera væl, og sjónleikarparið Bruce Willis og Demi Moore fara at finna saman aftur.

Nýggjar upplýsingar fara at koma fram um vanlukkuna við kavbátinum Kursk, og heimsbúskapurin fera vera fyri bakkasti.

Vølvan fekk rætt í nøkrum av sínum spádómum fyri 2000. Hon segði, at svenska prinsessan Viktoria fór at finna sær mann, og at Hilary Clinton fór at vinna eitt val. Hinvegin fekk hon ikki rætt í, at enska drotningamamman fór at doyggja á vári í ár.

# Øssur framsýning á Fjóni

**Øssur Mohr hevur komandi mánaðin framsýning á gallaríi í Nordskov**

LIST
*Eyðun Klakstein*

Í gjár lat upp ein framsýning hjá listamálaranum Øssur Mohr í Danmark. Framsýningin er á Galleri Munter, sum liggur í Norskov á Fjóni, og framsýningin verður opin til 3. mars.

Saman við Øssur fer eisini danska Agnetha Brittasius at sýna fram skurðmyndir og steinlutir.

Øssur Mohr, sum er úr Fuglafirði, hevur havt fleiri framsýningar uttanlands seinnu árini. Hann hevur eisini havt list við á øllum teimum stóru føroysku framsýningunum.

Á framsýningin á Fjóni verða 20 oljumálningar hjá listarmanninum at síggja.